# Fyrireika seg til at fáa útlendskar íleggjarar

**Føroyska royndarætlanin við einum alduorkuverki er á veg inn í eitt avgerðandi tíðarskeið**

ALDUORKA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ætlanin at gera eitt royndarverk í Føroyum, sum skal vinna orku burturúr aldu, er nú á veg inn í eitt avgerðandi tíðarskeið.

Hesa seinastu tíðina hevur ikki nógv verið at hoyrt um ætlanina, men tað merkir ikki, at onki er hent.

– Hetta seinasta hálva árið hava vit brúkt til at gera eina marknaðarkanning, sum hevur til endamáls at finna onnur støð úti í heimi, har ein slík skipan kann virka, sigur Ólavur Gregersen, stjóri í Sewave, sum stendur fyri ætlanini.

Hann sigur, at talan er um eina rættiliga dýra royndarætlan. Og av tí at talan er um eina royndarverkætlan, er ongin vissa fyri, at hetta er ein íløga, sum fer at geva avkast og sostatt er talan um eina sera vágafúsa íløgu.

Talan verður um eina íløgu upp á 30-35 milliónir og tað er greitt, at tað ber ikki til at útvega so stórar íleggjarar í Føroyum.

Tí verður neyðugt at finna útlendskar íleggjarar.

– Men skalt tað eydnast at finna útlendskar íleggjarar, mugu vit kunna vísa á, at talan er um eina skipan, sum eisini kann brúkast aðrastaðni enn í Føroyum.

Tað er í hesum sambandi, at ein marknaðarkanning er gjørd, har tey hava kannað øki bæði í Noregi, Bretlandi, Írlandi, Spania og í Portugal fyri at vita, um ein slík ætlan hevði kunnað brúkst har.

Ólavur Gregersen sigur, at tey eru ikki heilt liðug at útgreina úrslitini, men úrslitini verða løgd fram á oljuráðstevnuni ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum týsdagin

## Vil ikki avdúka

Av tí, at úrslitið verður lagt fram í Norðurlandahúsinum, vil hann ikki avdúkað tað frammanundan.

Hann sigur, at fyrrenn hetta úrslitið er greitt, ber ikki til at siga, um fígging fæst við ætlanina.

Og fyrrenn tað er greitt, at fígging fæst, ber heldur ikki til at arbeiða víðari við teirri føroysku ætlanini, tí næsta stigið verður at projektera eitt slíkt verk og tað verður ikki gjørt, fyrrenn fíggingin er greið.

Men stjórin í Sewave sigur, at tað er rættiliga stórur áhugi fyri hugskotinum, tí talan verður um eitt orkuverk, sum hvørki sæst ella hoyrist.

Men kortini er ov tíðliga at siga nakað um fíggingina.

– Kortini kann sigast, at útlitini fyri at hetta verður til veruleika, eru ikki verri nú, enn tey vóru fyri einum hálvum ári síðani.

Royndarverkið, sum ætlanin er at gera í Føroyum, er eitt alduorkuverk, sum er ein tunnilsskipan, sum er sprongd inn í bergið. Tunnilsalduorkuverkið er eitt verk, har aldan kemur inn í eitt "kamar" sum virkar sum eitt stempul. Ein luftturbina verður sett við endan av kamarinum, sum so brúkar lufttrýstið at framleiða streym við. Turbinan er bygd soleiðis, at tá ið hon er sett í gongd, verður hon drivin við lufttrýstinum – bæði, tá ið tað trýstur og sýgur. Og verkið hvørki sæst ella hoyrist.

Tey hava funnið fram til, at eitt slíkt royndarverk liggur best við Nípuna í Vágum, men eisini Søltuvík í Sandoy er eitt brúkiligt stað



*Útlini fyri ætlaða alduorkuverkinum í Føroyum eru ikki verri út nú enn tey hava verið, sigur Ólavur Gregersen, stjóri í Sewave*

T Ó R S H A V N
Conference city in the blue ocean



A city where visitors are still guests
and where guests are still
welcomed as friends

Geysir Petroleum



Hunting Faroese Elephants
www.geysirpetroleum.is